# Stjørnan styrkti um oddasessin

**HONDBÓLTUR** Stjørnan var ongantíð undir trýsti á Skála, og tá Tjaldur ikki fekk fult móti VB, styrktu kvinnurnar úr Klaksvík um oddasessin



**STYRKTU ODDASESSIN**

*Stjørnan á kós í FM-finaluna*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Uni Holm Johannesen

Lítil ferð, lítið hugflog og lítil spenningur.

Dysturin í Ítróttarhøllini á Skála hevði lítið upp á seg. Tá Stjørnan loksins setti ferðina upp í seinna hálvleiki hevði StÍF lítlan møguleika. Kvinnurnar úr Klaksvík vóru á odda 11-8 í hálvleikinum, og vunnu 26-20 at enda.

Tað var beinanvegin í seinna hálvleiki, at Stjørnan fór frá StÍF av álvara. Gestirnir fingu trý mál upp í slag, og heimaliðið svaraði ongantíð aftur. Munurin var sjáldan minni enn seks mál.

Stjørnan hevði fult tamarhald á dystinum, og sigurin var ongantíð í vanda. Spælið var seinastu løtuna merkt av, at kvinnurnar úr Klaksvík ikki skuldu fáa óneyðugar útvísingar ella skaðar, tí steypafinalan er á skránni næsta vikuskiftið.

Um tað er ein fyrimunur ella vansi, at Stjørnan spældi so lættan dyst hesaferð fyri steypafinaluna, fer tíðin at vísa. Svein Rógvi Nielsen, venjari, fer nú at fyrireika hópin til størsta einstaka dystin á árinum.

*uni@sosialurin.fo*



*Mynd:Álvur Haraldsen*

# Eydnaðist ikki at binda um

**HONDBÓLTUR** Kyndil var á odda við tveimum málum, tá 10 minuttir restaðu í. Grønlittu havnarkvinnurnar fingu einki mál seinastu løtuna, og VÍF fekk eitt óvæntað stig í høllini á Hálsi

Uni Holm Johannesen

Tað eydnaðist ikki Kyndli at binda um, hóast útlitini vóru góð. Heimaliðið stevndi móti sigrinum og var framman fyri við tveimum málum, tá farið varð undir seinastu 10 minuttirnar av dystinum. Tað gekk hinvegin illa í hond at fáa bóltin í málið hjá VÍF. Gestirnir gagnnýttu støðuna, skeyt tvey mál afturat, og so býttu liðini bara stigini millum sín.

Tað var ikki væntað frammanundan, at kvinnurnar úr Vestmanna skuldu standa Kyndil kurl. VÍF hevði bara fingið stig móti botnliðnum StÍF undan vitjanini í Havn. Tað var tískil fyrstu ferð, at VÍF fekk stig móti einum liði, sum er omanfyri á stigatalvuni.

Gestirnir úr Vestmanna løgdu bragdligari fyri hesaferð. Tær vóru á odda 6-3, tá fyrri hálvleikur var mest sum hálvrunnin. Tá fekk heimaliðið ferð á, og restina av dystinum togaðust liðini um leiðsluna. Kyndil var við yvirlutan, men VÍF rann treyðugt aftaná.

Randi S. Wardum, Kyndil, var toppskjútti við sjey málum.

*uni@sosialurin.fo*

# VB bíðar eftir avgerðini

**HONDBÓLTUR** Egill Steintórson, venjari hjá VB, hevur ikki stórvegis viðmerkingar til dramatisku hendingina. Hann og kvinnurnar úr Vági bíða eftir endaligu avgerðini og fyrireika seg til næstu uppgávuna

Uni Holm Johannesen

Egill Steintórson er avgjørdur.

– Eg harmist um, at dysturin fekk ein slíkan enda, tí tað var ein fantastiskur hondbóltsdystur. Eg haldi ikki, eg skal gera stórvegis viðmerkingar um, hvat fór fram seinastu løtuna. Vit stevndu móti sigrinum og vóru framman fyri við fimm málum fyri hvíldina og kunnu bara takka okkum sjálvum fyri, at tað varð so tætt seinastu løtuna, sigur Egill Steintórson.

Hann ger greitt, at dysturin móti Tjaldri er farin afturum, og fyrireikingarnar til næstu uppgávuna, StÍF á heimavølli, eru byrjaðar.

– Vit gera bara, sum tað verður sagt, leggur hann afturat.

**Gingið væl**

VB hevur ikki tapt fýra landskappingardystir upp í slag. Kvinnurnar úr Vági hava seinastu vikurnar vunnið á Stjørnuni, VÍF og Kyndli og spælt javnt móti Tjaldri.

Venjarin hjá VB vísir á, at hópurin var illa darvaður av skaðum fyrru kappingarhálvu. Steintórson hevur havt allar spælarnar tøkar seinastu vikurnar, og tað sæst best aftur á úrslitunum.

– Eg veit ikki, um tað er ein fyrimunur, at vit hava lítið at spæla fyri. Vit vilja sjálvandi vera við í oddastríðnum, men mugu bara ásanna, at tað er ov seint, sigur Egil Steintórson. Málið er nú at vinna seinastu sjey landskappingardystirnar.

**Hinar stríddust væl**

VB var við yvirlutan í fyrra hálvleiki, tá kvinnurnar úr Vági vitjaðu í høllini í Runavík. Munurin var fýra mál í hálvleikinum. Tjaldur legði nógv fyri frá byrjan í seinna hálvleiki og vunnu seg upp undir liðina á gestunum. Tað var serliga týdningarmikið, at Guðrun í Lágabø, sum vardi málið hjá Tjaldri, stóð væl og vardi meistarliga fyri fleiri ferðir. Tá togaðust liðini um leiðsluna.

Egil Steintórson hevur rósandi orð at bera mótstøðuliðnum.

– Vit vóru í góðari støðu, men misnýttu fleiri upplagdar málmøguleikar. Tjaldur stríddist væl eftir hvíldina, og tað gav okkum trupulleikar, sigur venjarin hjá VB.

Um tað so var rætt ella skeivt, at Tjaldur og VB býttu stigini millum sín fer Hondbóltssambandið at taka støðu til.

*uni@sosialurin.fo*

## Sunset Deildin *Kvinnur*

| NR. | LIÐ | DYSTIR | VUNNIN MÁL | TAPT MÁL | MUNUR | STIG |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Stjørnan | 17 | 487 | 397 | 90 | 28 |
| 2 | Tjaldur | 17 | 482 | 403 | 79 | 26 |
| 3 | Neistin | 16 | 437 | 367 | 70 | 24 |
| 4 | VB | 17 | 424 | 418 | 6 | 18 |
| 5 | Kyndil | 18 | 417 | 434 | -17 | 14 |
| 6 | VÍF | 17 | 383 | 466 | -83 | 7 |
| 7 | StÍF | 16 | 306 | 451 | -145 | 1 |

### **Kyndil – VÍF** 19-19 (10-10)

Dómarar: Ragnar Simonsen og Rúni Mohr

**10 min.: 2-4**
**20 min.: 6-6**
**40 min.: 16-15**
**50 min.: 19-17**

**Kyndil:** Randi S. Wardum 7, Jórun Ludvig 3, Heidi Maria Akselsen 3, Rannvá Carlsen 2, Anja Heinadóttir 2, Birita Mortansdóttir 1, Ásleyg Súnadóttir 1.
**VÍF:** Liljan Djurhuus 6, Agnas Olsen 4, Halla Durhuus 4, Elisa Leo 1, Tóra Seloy 1, Heidi Joensen 1, Linda Davidsen 1, Halla Midjord 1.
Útvísingar: Kyndil 3, VÍF 2.

### **StÍF – Stjørnan** 20-26 (8-11)

Dómarar: Thomas Juel Thomsen og Magnus í Króki

**10 min.: 3-2**
**20 min.: 6-6**
**40 min.: 12-17**
**50 min.: 17-22**

**StÍF:** Fríðrún Danielsen 8, Rebekka Justinussen 5, Bára Berthelsen 2, Birna Tummasardóttir 2, Irena Dam 1, Birita Poulsen 1, Lilja Gregersen 1.
**Stjørnan:** Valentina Suciu 8, Una Olsen 6, Judit Hansen 4, Durita Ljósstein 3, Alina Anghel 3, Maria við Neyst 2, Edith Hansen 1.
Útvísingar: StÍF 0, Stjørnan 2.